Helst eyka-konsert við Creamy

Enn er endaliga avgerðin ikki tikin, men tað tykist sum ein eykakonsert við hálvføroysku poppduoini Creamy er komin nærri.

Atgongumerkini til konsertina, sum verður í ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin 20. februar kl. 17.00, vóru seld eftir fimm døgum, og tað er neyvan áður komið fyri, at yvir 1800 atgongumerki eru seld eftir so stuttari tíð.

Ætlanin var at hava eina konsert í Havn eisini, men hendan konsertin var í fyrstu atløgu tikin av skránni. Men eftir at útselt er til konsertina í Runavík, er konsertin í Havn aftur komin uppá tal.

Í løtuni eru samráðingar millum umboðsfólk hjá Creamy og fyrireikararnar um at gera eina eykakonsert í Havn. Partarnir hava ikki verið samdir um treytirnar fyri hesa konsertina, men eftir tí, sum vit hava frætt, er ein eykakonsert nærri veruleikanum, enn hon hevur verið.

Um tað verður avgjørt at hava eina konsert í Havn, verður hon í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 19. februar.

Saman við Creamy fara eisini Kular røtur úr Klaksvík at spæla.

ek

Edward Fuglø í Listaskálanum

Listamaðurin Edward Fuglø fer at hava ársins fyrstu framsýning í Listaskálanum í Havn. Framsýningin við listarmanninum úr Klaksvík letur upp leygardagin klokkan 16.00.

Á fyrstu framsýningini hjá Edwardi í Listaskálanum verða oljumálningar og gouachemálningar sýndir fram.

34 ára gamli Edward Fuglø er útbúgvin pallmynda- og búnateknari frá skúlanum fyri brúkslist í Keypmannahavn.

Síðani hevur Edward gjørt pallmyndir í Føroyum, Danmark og Íslandi, og seinnu árini hevur hann eisini skrýtt barna- og skúlabøkur.

Edward hevur eisini arbeitt sum listamálari, og hann hevur millum annað sýnt fram í Norðurlandahúsinum, í Smiðjuni í Lítlvík og á Ólavsøkuframsýningini.

ek

Skotin John McSherry er sangari á nýggju útgávuni hjá Jørgini Dahl, sum kemur út í dag

Jørgin leitar heimaftur

***Ummæli:** Við nýggju soloútgávuni leitar Jørgin Dahl heimaftur til røturnar. Tónleikurin er symfoniskur rockur við einum dámi av farnari tíð*

Jørgin Dahl:
Lost Pilgrims
(Tutl, 2000)

Hann er meira besnissaður, enn hann hevur verið.

Ósmædni spontaniteturin frá útgávunum hjá Straight Ahead er burtur. Nú er talan um væl tilrættalagdan symfoniskan tónleik, har tónar úr 70'unum og 80'unum ikki verða fjaldir.

Í frálíka sanginum *Time to go home* verður sungið, at nú er tíð at fara heim til røturnar, og onkursvegna er hendan útgávan eitt ynski hjá Jørgini um at leita aftur til føroyskan tónleik, har hann hevur havt so nógvar sigrar.

Jørgin ætlar sær ikki heimaftur til Føroya at búgva, men gjøgnum nýggju útgávuna fær hann hóast alt høvi at senda 12 skeringar við tónleiki, hann hevur gjørt og lagt til rættis, heim til føroyingar.

Og komponisturin við teimum nógvu stóru avrikunum aftanfyri seg, hevur avrikað eina fløgu, sum staðfestir, at hann útviklað sín tónleikastíl, síðani hann miðskeiðis í 80'unum flutti til Danmarkar at búgva.

Øðrvísi

Lost Pilgrims er ein fløga við tónleiki, sum fólk ikki vanliga seta í samband við Jørgin Dahl.

Fyrstu tónarnir á fyrsta lagnum, *When tuesday came,* geva fyrstu ábendingarnar um, at symfonisk ljóðføri spæla ein týðandi leiklut í rocktónleikinum, sum Jørgin Dahl ger anno 2000.

Tað hoyrist tó aftur, at løgini eru skrivað av tiltikna sangskrivaranum úr Klaksvík, og millum skeringarnar eru sangir, sum kunnu gerast hitt. Ikki hitt bara fyri at verða hitt, men sangir sum kunnu standa eftir.

Jørgin Dahl syngur ikki sjálvur, og hann hevur bara gjørt eina av yrkingunum, tí hoyrist tað ikki eins væl hesaferð, at talan er um tónleik hjá Jørgin Dahl, sum tá fólk seta eina plátu hjá Straight Ahead á. Men hann hevur gjørt øll løgini, og hann hevur produserað tónleikin, og tað týðandi avrik í sær sjálvum.

Sangarin John McSherry ger eitt gott arbeiði, og á sangunum sum *Moments* og *Time to go home* fer hann rættiliga á flog. Tað eru eisini hesar báðar balladurnar, sum eftir fyrstu gjøgnumspælingarnar fanga oyrað, men sangir sum *When tuesday came, Seventh minute* og *I´m walking on pillows* blanda seg eisini uppí

Stórsligið

Tónleikurin er gjøgnumførdur symfoniskur rockur, og tað kann staðfestast, at stóru rockbólkarnir í 70-unum ikki hava spælt til fánýtis.

80'ini geva eisini Jørgini íblástur, men hann setir saman løg, tónar og arrangment saman soleiðis, sum eingin annar í Føroyum ger, og tí spyrst eitt serstakt úrslit burtur úr.

Tónleikurin er stundum stórsligin við kóri, strúkarum og øllum teimum elektrisku ljóðførunum. Detaljurnar eru nógvar, og úrslitið er lítið føroyskt.

Jørgin Dahl hevur altíð havt ein altjóða stíl, og hendan stílin endurskapar hann á *Lost Pilgrims*. Munurin er bara, at Jørgin Dahl er 16 ár eldri enn seinast, hann var við á eini veruligari útgávu, og onkursvegna hevur tað eitt meira sofistikerað ljóð við sær.

Men grundarlagið undir øllum tónleikinum hjá Jørgini er, at hann leggur seg eftir at gera løg, sum kunnu bera sangin, og soleiðis er eisini hesaferð.

Hann ljóðar framvegis øðrvísi enn aðrir føroyskir komponistar gera, og hann torir at gjøgnumføra tað, sum hann heldur verða rættast og best.

Tað hevur altíð verið eyðkenni hjá Jørgini Dahl, og *Lost Pilgrims* vísir, at Jørgin framvegis hevur nakað upp á hjartað tónleikaliga.

Lost Pilgrims kemur út í dag.Tað er plátufelagið Tutl, sum stendur fyri útgávuni.

Eyðun Klakstein

Oliver við Neyst, listamaður, hevur málað myndina á kápuni

Sjúkrasystraskúlin undir annað stýri

Helena Dam á Neystabø og Signar á Brúnni skrivaðu í gjár undir skjal, sum staðfestir, at Sjúkrasystraskúli Føroya nú ikki longur er undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, men undir landsstýrismanninum í undirvísingarmálum. Samstundis verður farið undir almanna- og heilsuútbúgvingar

DAGFINN OLSEN

Sjúkrasystraskúli Føroya er nú fluttur frá Almanna- og Heilsumálastýrinum til Undirvísingar og Mentamálastýrið.

Á samkomu fyrrapartin í gjár skrivaðu landsstýrismenninir á báðum økjum undir avtaluna.

Skúlin, sum er settur á stovn í 1960, er tann seinasti av sínum slag í Norðurlondum, sum verður fluttur undir undirvísingarverkið.

Framvegis samstarv

Høgni Joensen takkaði á samkomuni fyri seg sum skúlaráðsformaður fyri skúlan.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, bar fram røðu.

– Tað er sjálvandi við sorgblídni, at eg sum landsstýriskvinna í heilsumálum á henda hátt sigi fyrisitingarliga farvæl til sjúkrasystraskúlan. Tí vit hava altíð verið sera errin av sjúkrasystraskúlanum, og eg tori at siga, at skúlin hevur virkað væl og at tær útbúgvingar sum hann hevur kunnað givið føroyingum, hava verið á høgum støði. Tað er ongantíð sáddur nakar ivi um, at føroyskar sjúkrasystrar eru sera væl útbúnar, og hava eina góða barlast, segði Helena Dam á Neystabø.

Hon nevndi eisini, at talan er ikki um endaligt farvæl, tí samstarv verður framvegis.

– Eg vil til endans nýta høvi at minna Signar á Brúnni á, at tað verður framvegis heilsuverkið bæði tað føroyska og heilsuverkið í øðrum londum, sum skal taka ímóti teimum, sum nema sær útbúgving á sjúkrasystraskúlanum. Tað er tí umráðandi at vit varðveita eitt neyvt samstarv um, hvørji krøv eiga at verða sett útbúgvingunum, segði Helena Dam á Neystabø millum annað.

Signar á Brúnni nevndi í røðu síni, at ein felags meginregla í nútímans útbúgvingarpolitikki er tann, at útbúgvingar so vítt møguligt verða savnaðar undir einari ráðstovu.

– Í sambandi við at lógaruppskotið um almanna- og heilsuútbúgvingar varð lagt fram av nýggjum, gjørdu landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum og landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum tann 25. september 1998 av at kann møguleikarnar fyri, at Sjúkrasystraskúli Føroya skuldi kunna gerast másløki hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Aðalstjórarnir fingu til uppgávu at fyreika hetta mál og úrslitið gjørdist ein arbeiðsbólkur, ið legði fram álit í mars 1999, segði Signar á Brúnni.

Stórsinni

Við samanleggingini verður eisini sett á stovn almanna- og heilsuútbúgving og fegnaðust landstýrisfólkini um, at tað nú ikki longur verður neyðugt at fara uttanlanda at nema sær hesa útbúgving.

– Eg vil takka nevndini fyri eitt gott arbeiði. Helena Dam á Neystabø hevur í hesum sambandi víst stórsinni við at lata hesa útbúgving frá sær fyri at savna hana í eina størri eind. Eg vil nýta høvið til at takka Helenu fyri hesa avgerð hennara.

– Arbeiðsbólkuirn kom eisini til ta áhugaverdu niðurstøðu, at tað fór at bera til, at húsa báðum útbúgvingum í somu skúlaskipan. Hetta hevur verið roynt uttanlands við góðum úrsliti, segði Singar á Brúnni millum annað.

Kristianna Jacobsen, er sett sum fulltrúi

Byrja í august

Petur Petersen, aðalstjóri í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum greiddi nærri frá ætlanunum framyvir.

Sjúkrasystraskúlin verður undir Heilsumálastýrinum eina tíð afturat og eisini í somu hølum, sum nú. Ein 5 ára avtala er gjørd um hølisviðurskiftini.

Longu eftir summarfrítíðina byrja nýggju útbúgvingarnar.

Har verður møguleiki at taka heilsuhjálparaútbúgving, ið er 1 ára útbúgving, og heilsurøktaraútbúgving, ið tekur 1 1/2 ár. Fyri báðar útbúgvingar galda 1/3 skúlagongd og 2/3 starvsvenjing.

Eisini kann ein fara víðari til sjúkrasystir hendavegin og t.d. eisini til ljósmóðir.

Petur Petersen kom inn á mongu fyrimunirnar við samstarvi. Betri nýtsla av fíggjarliga tilfeinginum, starvsfólki og annað.

Rektari og fulltrúi

Fyri framman er at seta útbúgvingarráð við 5 limum við fakligum innliti. Lýsast skal eftir rektara.

Leiðandi lærarar skulu setast til báðar útbúgvingarnar.

Nýggjur fulltrúi er settur, sum skal seta alt hetta í verk. Tað er Kristianna Jacobsen.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, skrivaðu í gjár undir avtalu um, at Sjúkrasystraskúli Føroya nú skal undir Undirvísingar- og Mentamálastýrið. Samstundir verða settar á stovn almanna- og heilsuútbúgvingar í Føroyum

Mynd: Jens Kristian Vang

Konsertir

Konsertir við Eivør Pállsdóttir og Shalder Geo

DAGFINN OLSEN

Í gjárkvøldið, hóskvøld, spældi Eivør Pálssdóttir Kvartett í Kleopatra í Havn.

Nú halda tey fram konsertferðina. Vegna veður, var konsertin í síðstu víku í Gøtu flutt. Um vikuskiftið fara Eivør Pallsdóttir Kvartett og Shalder Geo á pall í Losjuni í Gøtu. Grót skipar fyri konsertini, sum er í kvøld, fríggjakvøld klokkan 20:00.

Leygarkvøldið spæla bólkarnir í Atlantis í Klaksvík. Henda konsertin verður klokkan 20:00.

Í gjárkvøldið, hóskvøldið, sang Eivør á Kleopatra í Havn og í kvøld er hon í Gøtu

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON.

REST-ÚTSØLA

Fríggjadagin og leygardagin

÷60%

Upp- og afturlatingartíðir: Mán.-mik. kl. 10.00-17.30
Hós.-frí. kl. 10.00-18.00
Ley. kl. 10.00-14.00

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON.